



# Endiliga!



Longu í gjárkvøldið var bøurin pakkaður við fólki í góðum lag



Tær allarflestu genturnar dyrkaðu Nik & Jay rættiliga nógv



Ungar gentir hugna sær á Summar Festivalinum

**Feitir tónar, blíð fólk og fantastiskt veður. Set hetta saman við veitsludámi og tú kemur fram til Summar Festivalin. Ljóðar hetta eisini sum nakað akkurát fyri teg? So kom til Klaksvík og tað beinanvegin.. :)**

FESTIVALUR

*Orð: Ragnhild Ellingsgaard*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Yes! So er ársins festivalur endiliga farin av bakkastokki. Dagurin byrjaði við sól og hita í luftini, meðan larmur hoyrdist um allan býin. Fólk tuskaðu aftur og fram fyri at fáa seinastu snøklarnar uppá pláss og endiliga – endiliga! – fingu summarfuglarnir í búkinum loyvi til ordiliga at sleppa á flog. Fyri framman liggur eitt deiligt vikuskiftið á tremur við feitum tónleiki, glaðum festivalgestum og ikki minst góðum veðri.

Fleiri konsertir vóru á skránni í gjárkvøldið og ikki kann sigast annað enn at kvøldið eydnaðist framúr væl. Huglagið fevndi um alt frá ektaðum popptøsum úr Keypmannahavn til brimbardar føroyskar rokkarar og allastaðni vóru fólk glað. Lítil børn, full fólk, gomul fólk og alt har ímillum fylgdust inni á festivaløkinum, meðan gittarspæl og angin av nýkveitum grillum leitaði sær veg av kampingøkinum. Lívið er herligt – ikki minst, tá Summar Festivalurin er á skránni!



*Popptøsirnar úr Danmark fingu allan Vágsbø upp á kók*



*Boys In A Band vóru einki minni enn fantastiskir á palli hóskvøldið*



*Rokkararnir úr The Dreams eru í ferð við at hertaka allan heimin – men hóskvøldið vóru teir á palli í Klaksvík og prógvaðu enn einaferð, at teir eru millum teir allarbestu nakrantíð*

## Dagsbillettir verða seldar við dyrnar

**Nú er Summar Festivalurin endiliga byrjaður. Um mett verður út frá fjøldini í gjárkvøldið kann væntast, at sera nógv folk fara at leita sær til Klaksvík hetta vikuskiftið – og tí hevur Summar Festivalurin gjørt av, at dagsbillettir nú eisini kunnu fáast til keyps. Hesar verða seldar við inngongdina og kosta 600 krónur fyri fríggjakvøld og 600 krónur fyri leygarkvøld.**

## Náttarbussar koyra fólk heim

**Vilt tú sleppa heim av festivalinum, men kanst ikki koyra sjálvur? So er gott við Náttarbussinum, sum koyrir øll kvøldini.**

**Fólk, sum vilja sleppa heim eftir tiltøkini á Summar Festivalinum, men ikki hava bil, kunnu brúka Náttarbussin. Bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið koyrir Náttarbussurin úr Klaksvík eftir tiltøkini. Bussurin koyrir frá parkeringsplássinum niðanfyri KÍ-høllina. Bussurin koyrir klokkan 02.30 hóskvøldið, og klokkan 04.30 fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Tilmelding skal gerast á 217752.**

## Gott veður á Summar Festivalinum

**Veðurmenninir lova gott veður næstu dagarnar. Tí kunnu vit vænta, at Summar Festivalurin kann haldast í turrum veðri, við sólglottum og lítlum vindi.**

**Petur Skeel Jacobsen, sum er veðurmaður í Miðlahúsinum, sigur um veðrið næstu dagarnar, at tað verður yvirhøvur turt veður við sólglottum. Vindmegin verður 5-10 m/sek, men minkandi fram ímóti vikuskiftinum. Hitin fer at liggja millum 14 og 17 stig.**

**Ársins Summar Festivalur kann tí haldast í góðveðri allar dagarnar.**